

www.oljan.fo

**Jan Müller** 17 - 11 - 2011

# Kunnu fáa nógv meiri olju úr Norðsjónum

Danmark fær alt ov lítið burtur úr oljutilfeinginum í Norðsjónum. Tað heldur í hvussu er Erling Stenby, sum er professari á DTU. Hann søknast eftir einari miðvísari ætlan, sum skal hava til endamáls at fáa meiri olju úr Norðsjónum, og hann heldur, at ætlanin hjá stjórnini at endurskoða avtaluna frá 2003 kann vera eitt gott høvi til at taka stig til at fáa meiri olju úr undirgrundini í Norðsjónum. Erling Stenby er av teirri uppfatan, at Danmark kann næstan tvífalda oljuna, sum landið pumpar upp undan Norðsjónum. Ein meting, sum danska Orkuráðið gjørdi, kom til ta niðurstøðu, at tá danir lata sínar verandi oljuleiðir aftur, eru bara 27 prosent av oljuni komin upp haðani. DTU-professarin mælir teimum ymsu pørtunum í donsku oljuvinnuni at fara í eitt óbindandi samstarv eftir norskari fyrimynd. Tað skal umfata oljuídnaðin, myndugleikarnar, granskingarumhvørvið og serfrøðingar og skal finna fram til, hvat Danmark tørvar fyri at fáa sum mest burtur úr oljutilfeinginum. "Gera danir tað, er tað realistiskt at útvinna 50 prosent av oljuni við teirri tøkni, sum er tø",, sigur Erling Stenby við Ritzau. ---------